## Fiskaaling vil frætta frá sílafiskarum um kúlulaks

GRANSKING: Fiskaaling er nú farið undir at kanna í hvussu stóran mun kúlulaksur búleikast í føroyskum firðum og áum. Endamálið er at fáa gjørt eina meting av í hvønn mun hetta fiskaslagið kann gerast ein hóttan móti alivinnuni, tá ræður um spjaðing av møguligum fiskasjúkum, sum ikki frammanundan finnast í Føroyum. Fiskaaling, sum ger kanningina eftir áheitan frá Havbúnaðarfelagnum, vil fegin hoyra frá sílafiskarum, sum hava fingið ella møguliga fara at fáa kúlulaks á húkin.



*Mynd: Norsk Institutt for Naturforskning*

Tað kemur fyri, at frítíðarfiskarar fáa kúlulaks (pukkellaks) á húkin, men eingin vitan er um, í hvussu stóran mun hetta laksaslagið er til staðar í føroyskum firðum og áum. Heldur ikki, um hesin laksurin møguliga er farin at gýta her, eins og eingin vitan er um ferðingar-mynstrið hjá kúlulaksinum.

Nevndin í Havbúnaðarfelagnum hevur sett sær fyri at fáa kannað, hvussu støðan er á hesum økinum og hevur tí heitt á Fiskaaling um at seta eina kanning í verk av kúlu-laksi í Føroyum.

Kanningin skal skráseta talið av fiskaðum kúlulaksum, kanna hann fyri sjúkur, og somu-leiðis staðfesta, um kúlulaksurin er farin at gýta í Føroyum ella ikki.

Við øðrum orðum skal kanningin staðfesta títtleikan av kúlulaksi í Føroyum, og í hvønn mun hetta fremmanda slagið av laksi kann gerast ein váði fyri føroysku vistfrøðina og ali-vinnuna, tá ræður um sjúku, sum framman-undan ikki finst í Føroyum.

*"Um kúlulaksurin fer at vísa seg at vera ein týðandi váði, má síðani verða mett um, hvørji bráðfengis tiltøk kunnu setast í verk til tess at forða fyri útbreiðslu av hesum laksaslagi,"* sigur Havbúnaðarfelagið.

Høvuðsøkið hjá kúlulaksinum er norðari partur av Kyrrahavinum. Hetta serliga slagið av laksi varð tó í sekstiárunum staðfest og fiskað í stórum nøgdum í norskum sjóøki, eftir at russar høvdu sett hann út sum alilaks við Kolahálvoynna. Seinni minkaði nøgdin av kúlu-laksi munandi aftur í Noregi. Á sumri í fjør var tó aftur staðfest lutfalsliga stórt tal av kúlu-laksi í norskum áum.

**Umframt kúluna, ið siljafiskurin fær í gýtingartíðarskeiðnum, er eitt eyðkenni fyri kúlulaksin, at hann hevur hvítan kjaft við svørtum góma. Í miðal vigar hann 2,2 kilo, men størsti skrásetti fiskurin vigaði 6,8 kilo.**

Fiskaaling heitir á øll, ið fáa kúlulaks, at lata hann til Fiskaaling, sum letur fíggjarliga sam-sýning afturfyri. **Tað er av alstórum týdningi, at fiskurin er so heilur og feskur sum gjørligt. Tað vil siga hvørki kruvdur ella frystur**. Í hesum sambandi kann ringjast til avvarðandi á Fiskaaling á telefon 774703.